# Umsókn um uppsøgn av lærusáttmála

Vegleiðing til umsóknarblaðið er á næstu síðu.
Yrkisdepilin skal góðkenna og skráseta allar broytingar, sum verða gjørdar í lærusáttmálanum.

| | |
|---|---|
| Navn á læruplássi | |
| V-tal | |
| Heitið á útbúgvingini | |
| Navn á lærlingi | |
| Føðingardagur | |
| Telnr. og tpostadr. | |
| Bústaður | |
| Skúli | |

*Navn og v-tal skulu samsvara við lærusáttmálan*

Uppsøgn — Set ein kross

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Í royndartíðini, tvs. áðrenn 6 mðr. | |
| 2 | Avtala millum báðar sáttmálapartarnar, krevur undirskrift frá báðum pørtum | |
| 3 | Einsíðis av virki | |
| 4 | Einsíðis av lærlingi | |

| | |
|---|---|
| Síðsti arbeiðsdagur hjá lærlinginum | |

Grundgeving fyri at siga lærusáttmálan upp, skal útfyllast um uppsøgn er einsíðis, nr. 3 ella 4:

| |
|---|
| |

Er uppsøgnin einsíðis verður umsóknin latin hinum partinum til hoyringar.

______________________
*Dagfesting*

______________________
*Undirskrift virkisleiðarans*

______________________
*Undirskrift lærlingsins*

______________________
*Undirskrift verjans*

Umsóknin skal sendast í telduposti til *yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo*

# Vegleiðing

Yrkisútbúgvingarlógin ásetur sum høvuðsreglu, at partarnir kunnu ikki einsíðis siga upp ein lærusáttmála, men bert um báðir partar skrivliga vátta hetta[1].

Tað eru tó nøkur undantøk, har tað ber til hjá tí eina partinum at siga sáttmálan upp. Hesi undantøk eru:
**1**) áðrenn royndartíðin á 6 mðr. er farin[2],
**2**) um annar parturin ikki heldur skyldur sínar[3], ella
**3**) um týdningarmikil broyting er í fortreyt fyri sáttmálanum[4].

**Nærri um 1**:
Annar parturin kann siga lærusáttmálan upp í royndartíðini, sum er teir fyrstu 6 mánaðirnir frároknað skúlagongd, ið ikki verður roknað upp í royndartíðina. Í tílíkum føri er ikki neyðugt at kunna um orsøkina til uppsøgn av lærusáttmála í oyðublaðnum á umsóknini.

**Nærri um 2 og 3:**
Annar parturin kann siga sáttmálan upp um hin parturin ikki heldur skyldur sínar ella ein týdningarmikil fortreyt fyri at gera lærusáttmálan er skeiv ella seinni dettur burtur. Í tílíkum føri skal grundgevingin fyri uppsøgn upplýsast á oyðublaðnum á s.1. Um tað ikki er gjørt verður uppsøgnin ikki viðgjørd.

Talan skal vera um týðandi viðurskifti, ið lagt verður til grund, annars er uppsøgnin ikki galdandi. Harafturat skal uppsøgnin fara fram innan ein mánað eftir, at uppsigandi parturin hevur fingið kunnleika um viðurskiftini ella eftir vanligum sketni skuldi havt fingið kunnleika til viðurskiftini, sum uppsøgnin er grundað á[5]. Ein uppsøgn kann ikki grundast á tørv á eykaundirvísing[6].

Er talan um einsíðis uppsøgn eftir lokna royndartíð má roknast við málsviðgerðartíð, tvs. at lærusáttmálin ikki kann setast úr gildi, fyrr enn Yrkisdepilin hevur mett um, hvørt upplýsta grundarlagið fyri uppsøgnini er nøktandi. Yrkisdepilin ringir til hin partin, umframt at senda umsóknina um einsíðis uppsøgn til hin partin til hoyringar við 14 daga freist at svara skrivliga.

Viðmerkjast skal, at um lærlingur verður útihýstur frá skúlagongdini fellur lærusáttmálin burtur[7] og í tílíkum førum er talan tískil ikki um eina uppsøgn. Tað er skúlin, ið tekur avgerð um burturvísing. Í tílíkum føri má virkið tó venda sær til Yrkisdeplinum fyri at ógilda lærusáttmálan.

[1] Lóg nr. 94/1998, § 38, stk. 1
[2] Lóg nr. 94/1998, § 38, stk. 2
[3] Lóg nr. 94/1998, § 39, stk. 1
[4] Lóg nr. 94/1998, § 39, stk. 2
[5] Lóg nr. 94/1998, § 39, stk. 3
[6] Lóg nr. 94/1998, § 39, stk. 4
[7] Lóg nr. 94/1998, § 39, stk. 5

## Tilskilað Yrkisdeplinum

*Møguligar viðmerkingar*

| | |
|---|---|
| ☐ | játtað / játtað við tillaging |
| ☐ | ikki játtað |

____________________ ____________________

*Dagfesting* *Undirskrift*